gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Haldið altíð vegin opnan niðuraftur

**Fyri tíggjundu ferð fingu næmingar á Fiskivinnuskúlanum handað fráfaringar-prógv. Í ár vóru næmingarnir níggju í tali**

PRÓVHANDAN
*Edvard Joensen*

**Fiskivinnuskúlin í Vestmanna:** –Tað er ivaleyst, at summi tykkara ætla sær á toppin í vinnulívinum. Men minnist altíð til, meðan tit eru á veg upp, at halda vegin opnan, so tit koma væl niðuraftur.

Soleiðis tók Thomas Arabo, lærari á Fiskivinnuskúlanum, millum annað til í røðu síni fyri næmingunum, sum hósdagin fingu prógv frá skúlanum.

Hann vísti á, hvussu umráðandi tað er hjá tí, sum hevur verið á toppinum, at duga at fóta sær, tá hann aftur er komin niður á slætt. Og tað fór so ella so at vera endin hjá teimum flestu, segði hann.

Tað er trongt í stovuni á Fiskivinnuskúlanum, har hátíðarhaldið er. Næmingar, næstringar, vinir, kenningar, lærara og onkur hendinga pressufólk eru stúgvað saman í hesi trongu stovuni. Heitt er. Kvalið, so næstan ikki er inniverandi, hóast stjórin í góðari tí hevur latið bæði hurðar og vindeygu upp.



*Hesi fingu prógv á Fiskivinnuskúlanum hósdagin. Í tilvildarligari røð: Unnur Didriksen, Vestmanna, Malena Poulsen, Klaksvík, Sólrun Kristensen, Tórshavn, Sóllind Oskarsdóttir, Vestmanna, Eli Müller, Vestmanna, Fríðleif Lydersen, Skálavík, Jens Sofus Thomsen, Hvalba, Símun Thomsen, Hvalba og Dánjal Jóhan Thomsen, Hvalba*

Fólk verða boðin vælkomin og kunnað um tað, sum fer at henda. Sangur og røður. Men sjálvandi er stórhendingin, tá næmingarnir, sum lidnir eru, fáa endaligu prógvini.

Eitt ark við nøkrum sangum á er býtt út, og sungið verður, áðrenn landsstýrismaðurin við undirvísingarmálum, Óli Holm fær orðið.

Hann segði millum annað í røðu síni, at væntast kann, at altjóða handilsavtalur fara at seta krøv til, at tey, sum framleiða matvørur, hava førleikar og kunnu skjalprógva teir. Størri dentur fer at verða lagdur á umhvørvisviðurskiftini og á burðardygga gagnnýtslu - og at hava starvsfólk, sum vita hvat hetta merkir.

Tí verða arbeiðsmegi og førleikarnir hjá starvsfólkunum øki, sum eru sera týdningarmiklir spurningar at arbeiða við komandi árini, segði Óli Holm, landsstýrismaður.

Jákup Andreasen, stjóri á Fiskivinnuskúlanum, handaði næmingunum prógv. Fyrst teimum, sum hava lokið fyrsta árið, støðisárið.

Síðan kom túrurin til tey endaligu prógvini, og fekk hvør næmingur eina stutta viðmerking frá stjóranum.

Onkur møtti tíðliga. Onkur var so virkin í ítrótti, at hann eftir stjórans meting var ov mikið burtur. Tó hevði hann sannført stjóran um, at soleiðis var ikki kortini. Onkur var, sum stjórin helt seg kenna. Men tað var kortini skeivur persónur, tá saman um kom, og so framvegis.

Og meðan prógvini vórðu handað teimum einstøku, høvdu øll hini úr at gera við at reisa seg og sleppa sum best fram at at taka myndir og ævigtgera løtuna.

Eftir handanina høvdu bæði næmingar og lærarar orðið, áðrenn løtan sera hátíðarliga endaði við, at fyrsta ørindi av Tjóðsanginum varð sungið.

Eftir sjálva próvhandanina beyð skúlin kaffi og smákøkur, meðan næmingarnir gingu runt og góvu hvørjum øðrum blómur.

# Tríggir ungir hvalbingar á útferð

**Tríggir brøður ur Hvalba fara at umboða Føroyar á European Business Game í Italia. Teir fingu allir prógv á Fiskivinnuskúlanum hósdagin og fóru avstað i gjár**

UMBOÐAN
*Edvard Joensen*

**Fiskivinnuskúlin:** Føroyar verða í ár umboðaðar á European Business Game í Bolzano í Italia av næmingum av Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Teir fara t sýna fram hugskotið til eitt útjaðarahús.

Teir tríggir, sum fara at umboða Føroyar í ár, eru hvalbingar. Teir eru brøður. Tveir teirra eru tvíburðar. Og allir tríggir fingu prógv á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna hósdagin.

Tað, hesir ungu hvalbiarbrøðurnir fara at sýna fram í Italia, er eitt uppskot um, hvussu til ber at menna útjaðaran. Teir skulu gera eitt sonevnt »multihús«. Eitt hús, sum kann taka sær av øllum tilfeingi, sum er at fáa á staðnum, har húsið verður sett.

Teir hava brúkt Skúvoy sum dømi og hava kunnað seg um viðurskiftini í oynni, greiðri ein teirra, Jens Sofus Thomsen, frá.

Tað, teir ætla at vísa fram í Italia er, hvussu best kann fáast burtur úr kjøti, fugli og fiski.

Teir ætla at skera kjálkar, salta og ræsa fisk. Fuglurin verður hagreiddur eftir gomlum, føroyskum siði og ætlandi seldur í Føroyum, meðan fiskurin verður útfluttur.

Teir hava hugsað nýtt, hesir ungu menninir. Til dømis ætla teir at selja kjálkar í sós sum lidnan rætt til Englands, meðan léttsaltað fiskafløk eisini skulu leggjast í sós og seljast til Fraklands.

Men tað er ikki bara fuglur og fiskur, sum fæst í Skúvoy. Vitilit eru bæði neyt og seyður í oynni, sum eisini skulu fáast til høldar.



*Teir tríggir hvalbiarbrøðurnir Símun, Dánjal Jóhan og Jens Sofus Thomsen fara at umboða Fiskivinnuskúlan og Føroyar í Europeiskari kapping í Bolzano í Italia*

*Mynd: Edvard Joensen*

Og til tess er húsið eisini góðkent, greiðir Jens Sofus Thomsen frá.

Hann sigur, at teir væl eru vitandi um vansar, sum kunnu standast av at blanda fisk og kjøt, og tí eisini hava gjørt húsið í tveimum. Framleiðsluhølini eru skild hvørt frá øðrum, meðan manningarrúmini eru felags fyri bæði, sigur hann. Tó eru skiftirúmini hvør sær.

Nú er tað so, sigur hann, at føroyingar bara hava loyvi at útflyta fisk og ikki fugl og kjøt. Krøvini til fiskaútflutningin eru strong, og tey skulu haldast.

Tann parturin av verkætlanini hjá hesum ungu hvalbingunum er eisini í lagi, siga teir. Teir hava fingið ráðgeving frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni alla tíðina, meðan teir hava arbeitt við at menna verkætlanina, sum teir fara til Italia við.

Sjálvandi er talan um eitt lítið hús, ikki nakað stórt sláturvirki, tí fólkatalið í eini bygd sum Skúvoy avmarkar tað sjálvt. Kortini halda fyrrverandi næmingarnir á Fiskivinnuskúlanum, at tað fer at bera til at skapa støðugt arbeiði í einum slíkum húsið til nøkur fólk alt árið.

Men tað er ikki realistiskt, viðganga teir, at rokna við, at ein bara kann byggja eitt slíkt hús og fara í gongd, og vænta, at tað fer at bera seg beinanveg.

Teir eru greiðir yvir, sum teir eisini hava víst á í roknskapinum, teir hava lagt við verkætlanini, at tað má stuðul av einumhvørjum slagi til fyri at koma í gongd, og tað fara helst eisini at ganga nøkur ár, áðrenn tað er upparbeitt so mikið, at tað fer at geva pengar, siga teir.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Heimaftur úr Grønlandi

**Hóast eingin olja var funnin í boringini í Grønlandi herfyri, so eru kortini stórar vónir til oljufund har. Og eisini føroyingar hava og eru við í fyrireikingunum til komandi oljuleiting. Ein teirra, Eyðfinnur Jacobsen er júst heimafturkomin men skal vera ráðgevi fyri grønlendskar ráevnismyndugleikar**

FLYTING
*Jan Müller*

Eftir at hava arbeitt sum deildarstjóri í grønlendsku ráevnisumsitingini í hálvtannað ár er Eyðfinnur Jacobsen nú komin heim aftur á klettarnar saman við konu og børnum. –Hetta hevur verið ein sera lærurík og spennandi tíð. Vit fóru til Grønlands at royna nakað annað enn man hevur verið vanur við. Nú vildi



*Eyðfinn Jacobsen saman við konuni Maibritt og tvíburðunum Silju og Bjørk, sum øll hava verið í Grønlandi í gott og væl eitt ár.*

familjan so aftur til Føroya sigur Eyðfinn Jacobsen, sum er útbúgvin løgfrøðingur og nú fer nú lutvíst aftur til sítt gamla fak. Hann skal vera filialleiðari hjá fyritøkuni Dania Advokater, sum hevur latið upp deild í Havn undir heitinum Dan Law. Hon heldur til í nýggja sparikassabygninginum við Tinghúsvegin. Skrivstovan kemur fyrst og fremst at taka sær av altjóða uppgávu, eitt nú í sambandi við komandi oljuvinnu.

Áðrenn Eyðfinn Jacobsen fór til Grønlands arbeiddi hann sum leiðari í kolvetnisskattadeildini í Fíggjarmálastýrinum. Undan tí rak hann sjálvstøðugt advokatvirki. Hann hevur gjørt av ikki at fara aftur í almennu umsitingina at arbeiða.

## Grønlendingar góðar vónir

Meðan Eyðfinn var í Grønlandi boraði Statoil á Fyllabankanum. Tað var við sama boriskipinum, West Navion, sum nú kemur til Føroya at bora fyri BP. Eyðfinn sigur, at hóast brunnurin, sum varð boraður í Grønlandi í heyst varð turrur, so eru vónirnar um at finna olju í Grønlandi ikki viknaðar. Arbeiði er í gongd við at fara undir fyrstu útbjóðingina. Hon skuldi vera í summar men er útsett í eitt hálvt ár. Orsøkin er tann, at landsstýrið ætlar at seta linari treytir til feløgini, sum fara at bora eitt nú við at lækka partafelagsskattin úr 35 niður í 30%. Eyðfinn Jacobsen sigur, at grønlendingar hyggja væl eftir, hvat hendir í Føroyum og í londunum her um leiðir. Eisini verður fylgt við gongdini í New Foundlandi og Kanada. Oljuboring í Grønlandi er sum so ikki nakað nýtt fyribrigdi. Í 70-unum vórðu boraðir einir seks brunnar í Vesturgrønlandi. Eisini hevur verið borað í Eysturgrønlandi. Alt uttan úrslit. Men grønlendingar hava sum sagt ikki mist vónina. Eyðfinn, sum í arbeiði sínum eisini hevur havt tætt tilknýti til vinnulívið sigur, at altjóða oljuídnaðurin hevur ikki mist áhugan fyri Grønlandi sum framtíðar oljuøki. Metingar jarðfrøðingar hava gjørt benda á, at Grønlendska undirgrundin kann goyma risastórar nøgdir av gassi og olju.

Umframt komandi virksemi sítt í Føroyum er ætlanin at Eyðfinn Jacobsen skal halda fram sum ráðgevi hjá grønlendsku ráevnisumsitingini.

# Aftur prískapping í luftini



*Lagt er enn einaferð upp til prískapping á flogrutunum millum Føroyar og Danmark*

**Maersk Air bjóðar aftur ferðafólki at ferðast bíliga millum Føroyar og Danmark. Hesaferð er talan um ferðing í háarstíð**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Um tú ætlar til til Keypmannahavar í summar ber til at ferðast millum Vágar og Kastrup fyri 1865,- krónur báðar vegir. Og tá eru øll avgjøld íroknað.

Soleiðis stendur í tíðindaskrivi, Maersk Air hevur sent út um dagarnar. Tíðarskeiðið, ferðast kann fyri hendan prísin, er frá 7. juli til 2. september. Í sama tíðarskeiði ber til at ferðast úr Vágum til Billund og aftur fyri 1.903,- krónur.

Treytir eru tó lagdar við hesum ferðaseðlum. Teir skulu keypast í tíðarskeiðnum frá 29. juni til 25. august og nýtast í áður nevnda tíðarskeiði.

Fyri at fáa hesar bíligu ferðaseðlarnar, skulu í minsta lagi tvey fólk vera í ferðalagi, eins og tey skulu vera burtur minst eitt vikuskifti. Ella sum tað verður sagt í tíðindaskrivinum frá Maersk Air, er leygar- og sunnudagsreglan galdandi. Tann, sum ferðast við slíkum ferðaseðli, skal verða burtur í mesta lagi 21 dagar. Og ikki ber til at fáa ein goldnan ferðaseðil endurgoldnan ella broyttan.

Hetta tilboðið líkist nógv teimum, sum Maersk Air fyrr hevur boðið føroyingum. Tó er tað nýggja í hesum, at tað er galdandi í háarstíð, meðan hini bert hava verið uttan fyri sjálva summarfrítíðina.

Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, sigur í tíðindaskrivinum, at Maersk Air nú endurtekur tey væleydnaðu átøkini frá fyrr.

–Vit gleðast um stóru undirtøkuna frá føroyingum og vilja á hendan hátt kvitta fyri ta undirtøkuna, sigur Keld Mosgaard Christensen, rutustjóri hjá Maersk Air, í tíðindaksrivi í samband við nýggja prísátakið á Føroyarutuni.

# Fáa nú meiri sól á Tvøroyri

**Í dag letur nýggj sólmiðstøð upp á Tvøroyri við teimum mest framkomnu sólunum, sum til eru**

VÆLVERA
*Áki Bertholdsen*

Teir suðuroyingar, sum vilja verða brúnir, fáa nú ein møguleika afturat. Tí í dag letur hin 21 ára gamla tvøragentan, Eyðbritt Tjaldrastein, sólmiðstøð í heimbýnum, í sama húsi, sum teldukaféin Delphi er í frammanundan.

Tað er í samstarvi við Consul Sól, sum eigur sólirnar, at Eyðbritt Tjaldrastein nú letur sólmiðstøð upp á Tvøroyri. Hon leigar sólirnar frá Consul sól, sum frammanundan hevur sólir í Havn, Fuglafirði og í Klaks vík.

Í nýggju sólmiðstøðini á Tvøroyri eru tríggjar sólir og hetta eru tær mest framkomnu sólirnar, sum til eru. Eigarin sigur, at tær hava nýggj rør, sum ikki hava lyndi til at brenna so illa sum summar aðrar, eldri sólir, men hinvegin brúnka tær meir.

Sólirnar hava eisini serligar køliskipanir og luftskifti, so at tað ikki kennist kvalandi heitt at liggja undir teimum.

Serliga tann eina sólin er sera framkomin, Har er undirlagi lagað til kroppin, Hon hevur eisini fløguspælara, so tilber at hoyra góðan tónleik ímeðan ein sólar sær. Tað ber tó ikki til at hava fløgur við, men fløgur lagdar í spælaran og tær verða so skiftar út av við regluligum millumbili. Hendan sólin sigur eisaini frá, hvat hendir, eitt nú, tá ið hon kølir, ella tá í lós tendrar o.s.fr.

Eitt snilt við hesi sólmiðstøðini er, at tað er óneyðugt at biðja um tíð. Støðin er ómannað, men eitt ljós sigur frá, um onkur av sólunum bundin, ella ikki. Tann, sum ætlar at sóla sær, skal koyra pening í og leggur seg tilrættis.

Tað kostar 20 krónur fyri seks minuttir undir teirri fínu sólini og 20 krónur fyri sjey minuttir undir hinum báðum.

Nýggja sólmiðstøðin á Tvøroyri er opin hvønn dag í vikuni frá kl. 7 á morgni til á midnátt.



*Eyðbritt Tjaldrastein letur í dag nýggja sólmiðstøð upp á Tvøroyri við teimum mest framkomnu sólunum, sum til eru*